## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag, sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og norði, turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 18 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 15 stig.

# All of ME

**37 sangir við sama sangara, men av ógvuliga ymiskum útgávum. Soleiðis er nýggja fløgan hjá Kim Hansen samansett**

ÚTGÀVA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Hann hevur verið við í einum ótali av útgávum, men ongantíð hevur hansara navn staðið einasamalt á húsanum. Men nú er øðrvísi. Kim Hansen hevur givið eina dupultfløgu við 37 sangum út.

- Skuldi eg fari undir at geva fløgur út, so mátti eg sleppa av við alt, eg havi liggjandi fyrst, sigur Kim Hansen.

Víðagitni tónleikarin hevur savnað alt, sum hann hevur sungið á útgávum og á nøkur demo løg, í hesari nýggju útgávuni.

### Byrjaði at spæla

Tónleikurin hevur altíð fylt nógv hjá Kim Hansen. Sum tíggju ára gamal fekk hann sítt fyrsta ljómborð. Hann var bundin til eina koyristól, og tí fann onkur upp á ráð, og gav Kim eitt ljómborð. Og hann slepti ongantíð ljómborðinum og klaverinum. Fyrst við bólkum úr Nólsoy og seinni saman við øðrum bólkum hevur hann spælt eitt ótal av konsertum og partur av nógvum bólkum, teirra millum Taxi og Moirae, ið báðir hava vunnið Prix Føroyar.

- Mítt lív er tónleikur. Tað er tónleikur frá morgni til myrkurs, sigur Kim Hansen.

Elsti sangurin á fløguni kom á fyrsa sinni út í fløguni hjá Jóanes & Co. og kallast Story of Love.

- Eg arbeiddi á flakavirki síðsti í áttatiárunum. Eg fór í studio í Havn og nýtta allar pengarnar upp á at innspæla hendan sangin. Hann ljóðar ikki fantistiskt, men eg helt, hann skuldi við, sigur Kim Hansen.

### Poppari

Nýggja dupultfløgan spennir rættiliga víða. Vit finna bæði sangirnar hja B68 og B36 eins og onkur jólasangur hevur svíkt seg uppí.

- Eg eri ein poppari, og hoyrist eisini aftur á fløgunum, sigur Kim Hansen.

Hann hevur í hyggju at geva fleiri fløgur út í næstum. À nýggju útgávuni er eitt spildurnýtt lag, ið kallast Something about you.



*Kim er farin á rull. Fyri fyrstu ferð gevur Kim Hansen út undir egnum navni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 13 |
| Nuuk | 14 |
| Qaqortoq | 13 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 14 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 18 |
| Tromsø | 15 |
| Bergen | 16 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 36 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 32 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 32 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 11 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1026 hPa. yvir Íslandi fer spakuliga vestureftir og viknar nakað. Eitt lágtrýst, 1005 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer í landsynning eystan.




**Í dag:**
Hátrýstið vestan fyri Ísland stendur mestsum í stað. Lágtrýstið í útsynning úr Írlandi fer spakuliga eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/7 kl. 06⁰⁰– 22/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,8°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 25,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 21/7 kl. 06⁰⁰– 22/7 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 44,2 mm

ÚF

## Morgunlestrar
**25., 28. og 30. juni**

***Hans Jacob Joensen, biskupur, lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 25. juli:**
nr. 1 Harra Gud, títt dýra navn og æra
nr. 19 Nú takkið Gudi øll

**Týsdagin 26. juli:**
nr. 40 Hvør kann Harrans stórverk fata
nr. 305 Leið meg, Gud, á lívsins leið

**Mikudagin 27. juli:**
nr. 487 Mín Guð, eg vil ei víkja

**Hósdagin 28. juli:**
nr. 592 Vár Guð, tær verið hægsta rós

**Leygardagin 30. juli:**
nr. 278 Tú, eina tú, o Harra Krist




## VESTFALLSKYRRINDI

21. juli — Fullmáni/mánin næstur jørðini
28. juli — Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. Juli | 09.09 | 21.35 | 08.09 | 20.35 | 08.24 | 20.50 | 11.09 | 23.35 | - | 12.09 |
| 24. Juli | 10.01 | 22.25 | 09.01 | 21.25 | 09.16 | 21.40 | - | 12.01 | 00.35 | 13.01 |
| 25. Juli | 10.50 | 23.12 | 09.50 | 22.12 | 10.05 | 22.27 | 00.25 | 12.50 | 01.25 | 13.50 |
| 26. Juli | 11.35 | 23.57 | 10.35 | 22.57 | 10.50 | 23.12 | 01.12 | 13.35 | 02.12 | 14.35 |
| 27. Juli | - | 12.20 | 11.20 | 23.56 | 11.35 | - | 01.57 | 14.20 | 02.57 | 15.20 |

| Dagur | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. Juli | 07.24 | 19.50 | 06.24 | 18.50 | 09.24 | 21.50 | 10.24 | 22.50 | 08.54 | 21.20 | 10.09 | 22.35 |
| 24. Juli | 08.16 | 20.40 | 07.16 | 19.40 | 10.16 | 22.40 | 11.16 | 23.40 | 09.46 | 22.10 | 11.01 | 23.25 |
| 25. Juli | 09.05 | 21.27 | 08.05 | 20.27 | 11.05 | 23.27 | - | 12.05 | 10.35 | 22.57 | 11.50 | - |
| 26. Juli | 09.50 | 22.12 | 08.50 | 21.12 | 11.50 | - | 00.27 | 12.50 | 11.20 | 23.42 | 00.12 | 12.35 |
| 27. Juli | 10.35 | 23.11 | 09.35 | 22.11 | 00.12 | 12.35 | 01.12 | 13.35 | - | 12.05 | 00.57 | 13.20 |

5 707265 100067 >